## Danska superligan

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK (M) | 32 | 19 | 8 | 5 | 52 | 25 | 27 | 65 |
| 2 Brøndby (S) | 32 | 19 | 7 | 6 | 53 | 28 | 25 | 64 |
| 3 Esbjerg | 32 | 17 | 8 | 7 | 65 | 41 | 24 | 59 |
| 4 OB | 32 | 15 | 9 | 8 | 62 | 46 | 16 | 54 |
| 5 AaB | 32 | 15 | 9 | 8 | 52 | 40 | 12 | 54 |
| 6 FCM | 32 | 14 | 6 | 12 | 64 | 48 | 16 | 48 |
| 7 Viborg | 32 | 10 | 9 | 13 | 45 | 44 | 1 | 39 |
| 8 AGF | 32 | 11 | 3 | 18 | 45 | 65 | -20 | 36 |
| 9 FC Nordsj. | 32 | 7 | 11 | 14 | 33 | 55 | -22 | 32 |
| 10 Herfølge | 32 | 8 | 7 | 17 | 34 | 53 | -19 | 31 |
| 11 Frem | 32 | 8 | 3 | 21 | 37 | 59 | -22 | 27 |
| 12 AB | 32 | 8 | 2 | 22 | 30 | 68 | -38 | 26 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

## Danska 1. deild

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 26 | 19 | 4 | 3 | 61 | 18 | 43 | 61 |
| 2 Randers FC | 26 | 18 | 3 | 5 | 74 | 37 | 37 | 57 |
| 3 AC Horsens | 26 | 16 | 5 | 5 | 42 | 20 | 22 | 53 |
| 4 Køge | 26 | 14 | 7 | 5 | 50 | 35 | 15 | 49 |
| 5 Sønderjyske E | 26 | 14 | 6 | 6 | 65 | 40 | 25 | 48 |
| 6 Skjold | 26 | 13 | 4 | 9 | 53 | 45 | 8 | 43 |
| 7 Nykøbing | 26 | 12 | 4 | 10 | 42 | 41 | 1 | 40 |
| 8 Ølstykke | 26 | 12 | 3 | 11 | 56 | 48 | 8 | 39 |
| 9 Fredericia | 26 | 8 | 9 | 9 | 36 | 37 | -1 | 33 |
| 10 FC Nordj. | 26 | 8 | 8 | 10 | 30 | 39 | -9 | 32 |
| 11 Fremad Am. | 26 | 7 | 7 | 12 | 36 | 46 | -10 | 28 |
| 12 Brønshøj | 26 | 6 | 6 | 14 | 37 | 61 | -24 | 24 |
| 13 B 93 | 26 | 5 | 7 | 14 | 33 | 46 | -13 | 22 |
| 14 Vejle | 26 | 5 | 6 | 15 | 32 | 56 | -24 | 21 |
| 15 FC Aarhus | 26 | 5 | 3 | 18 | 25 | 63 | -38 | 18 |
| 16 B 1913 | 26 | 2 | 6 | 18 | 20 | 60 | -40 | 12 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dalum | 26 | 16 | 5 | 5 | 61 | 34 | 27 | 53 |
| 2 HIK | 26 | 14 | 7 | 5 | 54 | 37 | 17 | 49 |
| 3 Næstved | 26 | 13 | 8 | 5 | 54 | 27 | 27 | 47 |
| 4 Holbæk | 26 | 12 | 7 | 7 | 54 | 39 | 15 | 43 |
| 5 Kolding FC | 26 | 12 | 7 | 7 | 46 | 39 | 7 | 43 |
| 6 Slagelse | 26 | 10 | 7 | 9 | 47 | 39 | 8 | 37 |
| 7 B1909 | 26 | 11 | 4 | 11 | 49 | 42 | 7 | 37 |
| 8 Brabrand | 26 | 9 | 8 | 9 | 47 | 38 | 9 | 35 |
| 9 Glostrup | 26 | 10 | 4 | 12 | 48 | 50 | -2 | 34 |
| 10 Lyngby | 26 | 7 | 9 | 10 | 44 | 56 | -12 | 30 |
| 11 Hjørring | 26 | 9 | 3 | 14 | 37 | 69 | -32 | 30 |
| 12 Jetsmark | 26 | 7 | 8 | 11 | 34 | 55 | -21 | 29 |
| 13 Skive | 26 | 8 | 4 | 14 | 45 | 52 | -7 | 28 |
| 14 Kalundborg | 26 | 6 | 9 | 11 | 52 | 58 | -6 | 27 |
| 15 Holstebro | 26 | 7 | 5 | 14 | 43 | 57 | -14 | 26 |
| 16 Hvidovre | 26 | 5 | 9 | 12 | 29 | 52 | -23 | 24 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

## Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Keflavík | 2 | 2 | 0 | 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 2 Fram | 2 | 1 | 1 | 0 | 4 | 1 | 3 | 4 |
| 3 Fylkir | 2 | 1 | 1 | 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 4 KA | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 5 FH | 2 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 | 0 | 3 |
| 6 ÍBV | 2 | 0 | 2 | 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 7 ÍA | 2 | 0 | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 8 Grindavík | 2 | 0 | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 9 KR | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 10 Víkingur R | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

# Spenningur til síðsta sparkið

**Í evstu løtu eydnaðist tað FCK at javna ímóti AaB og harvið at varðveita møguleikan sjálvir at gera um, um teir skulu gerast meistarar ella ikki**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað er væl pallsett í donsku fótbóltskappingini. Síðsta umfarið verður spælt hvítusunnuaftan, og tað verður ikki fyrrenn eftir síðsta bríkslið leygardagin, at tað er greitt, hvør fer at vinna meistaraskapin.

Sunnudagin varð greitt, at tað verður Brøndby ella FCK, sum verður meistari. Esbjerg hevur verið væl fyri, men sunnudagin taptu teir fyri fjóru ferð á rað. Tað ber ikki til í endaspurtinum, um tú ætlar tær at gerast meistari. Í Esbjerg eru teir vónbrotnir av, at teir fingu gummibein og ikki megnaðu at halda tørn, tá ið tað ráddi mest um. Men teir eru samstundis fegnir um, at teir rukku tí, sum teir undan kappingarbyrjan ætlaðu sær.

Hesa ferð tapti Esbjerg í Herning. Hetta var fjórða ferðin, at FCM spældi á nýggja heimavøllinum, og hetta var fjórða ferðin, at teir vunnu. Sigursmálið fingu teir tríggjar minuttir undan leikloki, eftir at Esbjerg hevði verið frammanfyri frá 12. og til 65. minutt. Nógvir fótbóltskeypmenn vóru og sýnaðu egyptiska Mohamed Zidan hjá heimaliðnum. Hann skoraði ikki hesa ferð, men hann spældi væl, og tað er rættuliga sannlíkt, at hann fer at spæla onkra aðra staðni enn í Herning eftir summarsteðgin.



*Í evstu løtu eydnaðist FCK at javna móti AaB, soleiðis at tað framvegis eru hvítu leyvurnar, sum standa við avgerðini um DM-gullið*

### Stóra kappingin

Í Keypmannahavn var Brøndby eina løtu sunnudagin á fyrsta plássinum. Í Valby løgdu teir seg á odda í 5. minutti, og tá ið AaB legði seg á odda í Parkini ímóti FCK, var Brøndby ovast á støðutalvuni. Brøndby økti til 3-0, áðrenn Frem svaraði aftur, og minkaði um munin til 3-1. Tvey tey síðstu Brøndby málini skoraði Andreas Jakobsson, sum verður í svensku miðverjuni, tá ið EM kappingin verður í Portugal um tvær vikur.

Í Parkini stóð leingi ikki so væl til hjá FCK. Todi Jónsson og Álvaro Santos vóru í FCK álopinum. Í 1. hálvleiki fingu teir ikki stóran stuðul aftanífrá. Todi, sum orsaka av lítlari spælitíð ikki er heilt á toppinum, hevði onkrar royndir, sum fóru við síðuna av. Bestu FCK royndina í 1. hálvleiki átti Álvaro Santos, tá ið hann sera hegnisliga tamdi høga sending og sendi bóltin í stólpan.

Tveir minuttr undan hvíldini kom AaB á odda. Undan sunnudegnum varð møguleikin nevndur, at AaB fór at geva FCK sigurin, so FCK gjørdist meistari, og AaB harvið sum tapari í steypafinaluni skuldi vinna pláss í UEFA Cup. Hesum ørvitistosinum gjørdi AaB rudduliga til skammar. Teir vóru álopshugaðir, trýstu heimaliðið aftur á vøllin, og tveir minuttir undan hvíldini stútaði Thomas Augustinussen teir framum eftir innlegg úr høgru.

Eftir steðgin royndi FCK at trýsta. Todi Jónsson varð útskiftur, tá ið ein tími var farin. Tríggjar minuttir undan leikloki varð suðurafrikanski Elri van Heerden settur á vøllin. Hetta var fyrsta royndin hjá honum á FCK liðnum. Fyrstu ferð hann nært bóltinum var, tá ið Álvaro spældi út frá til hansara, og nýggi maðurin úr tjúgu metrum og við innaru síðuni sendi framvið AaB málverjanum, Jimmy Nielsen, sum annars var besti maður á vøllinum. Ovurstórur fagnaður, og FCK hevur framvegis avgerðina í egnum hondum.

Tað er eitt stig aftur til Brøndby, sum eftir fyrsta sigurin á útivølli í vár er stórfavorittur á heimavølli ímóti niðurflutta AB.

FCK skal spæla á útivølli ímóti FCN í Farum. Har fara áskoðarainntøkurnar at verða væl størri leygardagin, enn tær plaga at vera. Í FCK kenna teir treytirnar. Teir skulu fáa trý stig burturúr. Meiri spennandi fær tað illa verið.

### Niðurflytingin avgjørd

Undan vikuskiftinum var tað greitt, at AB næsta kappingarár skal spæla í næstbestu deildini. Sunnudagin høvdu teir í Gladsaxe vitjan av AGF, sum við sigri hevði møguleika at vinna seg fram á sjeynda plássið. AB hevur vunnið síðstu ferðirnar, og teir tykjast ætla at biðja farvæl við manér. Íslendski Helgi Sigurðsson minkaði fyri AGF um munin til 2-1, men AB vann 3-1.

Eftir tapið ímóti Brøndby var greitt, at Frem í hesum umfarinum bara slapp at spæla eitt ár í bestu deildini. Herfølge og FCN hava verið í vanda fyri at flyta niður. Sunnudagn spældu tey 1-1 í Herfølge, og harvið tryggjaðu bæði liðini sær eitt ár afturat í bestu deildini.

Viborg og OB spældu 2-2. Í OB var einki at síggja til Jákup á Borg. Hann hevur síðstu vikuna spælt tríggjar dystir í Danmarksseriuni, har hann í síðstu viku skoraði eitt mál.

Skráin í 33. og síðsta umfarinum, sum verður leygardagin 29. mai ella hvítusunnuaftan er henda: Brøndby-AB, FCN-FCK, OB-Herfølge, Esbjerg-Frem, AGF-Viborg og AaB-FCM.

# Johan flytur ikki upp

**Fýra umfør undan kappingarenda bendir nógv á, at felagið hjá Christian Høgna skal flyta niður, og at Fremad Amager skal eiga rættin til næstbestu deildina í eitt ár afturat**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Hjá Horsens og Johan B. Hansen hevur gongdin í vár mint nógv um hana hjá Brøndby. Eftir greitt fremsta pláss í vetrarsteðginum hava teir søplað leiðsluna burtur. Í fyrstu atløgu tóktist tað sum um, at næstfremsta plássið fór at verða tryggjað, og tað hevði verið nóg mikið til uppflyting. Men nú sær einki út, og fýra umfør undan kappingarenda er støðan soleiðis, at tað næstan skal eitt undur til, um Horsens skal vinna næstfremsta plássið frá Randers.

Sunnudagin var Horsens í Fredericia. Heimaliðið hevði ikki vunnið síðani vetrarsteðgin, men tað sást ikki á avrikinum. Fredericia vann 3-0 á Horsens, sum ikki tykist sleppa av aftur við gummibeinini.

Hjá oddaliðunum var eingin slingur í valsinum. Silkeborg sum ivaleyst verður tryggjað matematiskt at flyta upp næsta vikuskifti, vann 5-0 á illa stadda FC Aarhus, og Randers vann ikki minni enn 7-0 í Vejle! Hetta man vera ein tann størsti ósigurin hjá Vejle á heimavølli í mong, mong ár.

Felagið hjá Christian Høgna Jacobsen er ikki væl fyri. Stórtapið bendir á ikki serligar vánir at vinna tað, sum krevst fyri at yvirliva. Vejle er undir strikuni, men teir eru ikki heilt dumpaðir enn. Fyri Vejle kom tað væl við, at Skjold vann grannastríðið 1-0 ímóti B93, tí B93 er bara eitt stig frammanfyri Vejle.

Niðurflutta B1913 vann 3-2 á Brønshøj, sum harvið framvegis er møguligur niðurflytari.

Fremad Amager slapp næstan leyst av hóttanini um niðurflyting. Eftir fyrra umfarið sá tað ikki væl út á heimavøllinum í Sundby, har Sønderjyske var frammanfyri 2-0. Eingin føroyingur hevði verið á vøllinum í fyrra umfarinum. Beinanvegin eftir steðgin kom Hjalgrím Elttør inn, og í 58. minutti varð Andrew av Fløtum skiftur inn. Hann hevði bara verið á vøllinum í tveir minuttir, tá ið hann minkaði um munin, og tríggjar minuttir undan leikloki javnaði Fremad Amager til 2-2. Einki var at síggja til Jann Inga Petersen.



# Vágastríðið stendur við

**Í farnu viku sendi nevndin í MB út tíðindaskriv, men stórur partur av hesum verður avvíst sum beinleiðis lygn av FS Vágum**

FS VÁGAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru nú tríggjar vikur síðani, at MB í tíðindaskrivi boðaði frá, at tey tóku seg úr samstarvinum, FS Vágar.

Umframt at siga samstarvið upp, so var tað tó ikki stórvegis upplýsingar, sum nevndin í MB vildi geva frá sær, men í farnu viku varð so eitt tíðindaskriv sent fjølmiðlunum.

Í hesum førdi MB millum annað fram, at tey ikki kundu góðtaka, at FS Vágar ætlaði sær at yvirtaka allar ungdómsdeildirnar, og hartil varð sagt, at enn hevur MB ikki fingið eina krónu av UEFA-pengunum, sum verða latnir feløgunum til ungdómsarbeiðið.

Eisini sigur MB, at nevndin als einki skeivt hevur gjørt í hesum málinum, vísandi til ivan, sum hevur tikið seg upp, hvørt nevndin yvir høvur hevði heimild til at taka hetta stigið.



*Stríðið um FS Vágar tykjast standa við. Nú verður tíðindaskrivið, sum MB sendi út í farnu viku, afturvíst av nevndini hjá FS Vágum*

### Svørt lygn

Í FS Vágum vilja tey ikki soleiðis uttan víðari hava sitandi á sær, at MB leggur tey undir at vera orsøkin til slitið. Og hartil sigur nevndin, at nógv av tí, sum MB førir fram, er beinleiðis lygn.

Millum annað førir MB fram í sínum skrivi, at tey eiga tveir limir í nevndini fyri FS Vágar, men sambært viðtøkunum fyri felagsliðið, so er hetta tó ikki heilt rætt.

Í viðtøkunum fyri FS Vágar stendur, at ein 6-mannanevnd verður vald at standa fyri dagliga rakstrinum, og at MB og SÍF eiga hvør sín lim av hesum seks.

Hartil sigur MB, at limirnir í FSV-nevndini hava sýtt fyri at lata MB innlit í gerabøkur og roknskapir, men sambært FS Vágum er einki um hesar atfinningar. Heldur ikki siga tey nakað vera um tosið, at FSV ætlar at leggja allan fótbóltin í oynni undir seg.

– Tað, sum vit hava ynskt, er at yngru leikararnir hjá SÍF og MB hava møguleika at spæla á einum liði, sum kann spæla um heilan vøll. Tilfeingið í feløgunum loyvir ikki meira, enn at taka lut í kappingunum um hálvan vøll, og tað sigur seg sjálvt, at hetta er ein bági fyri menningina av leikarunum.

### MB eigur ikki pengarnar

Um UEFA pengarnar sigur MB – sum tað er nevnt omanfyri – at enn hava tey ikki sæð eina krónu av hesum.

Til hetta siga tey í FS, at tað sum so er rætt, men síðani verður lagt aftur, at MB als ikki eigur hesar pengar.

Reglurnar fyri býtið av pengunum staðfesta, at tað eru tey feløg, sum taka lut í vaksnamannadeildunum, og sum ikki vinna seg fram til europeisku kappingarnar, sum eiga hendan peningin. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað er FS Vágar, sum er móttakari av upphæddini.

Og um nýtsluna av pengunum siga tey í FS, at hesir eru nýttir beinleiðis til ungdómsarbeiðið.

– Vit hava venjarar til tey ungdómslið, sum eru í felagsliðnum, og hesir kosta sjálvandi. Hartil kostar tað eisini at fáa leikarar aftur og fram til venjingar og dystir, og í triðja lagi, so skal roknskapurin fyri hesar útreiðslur góðkennast, áðrenn FSF letur pengarnar, eru greiðu boðini úr FS Vágum hesum viðvíkjandi.

– Og eru tað pengar, sum standa í vegin fyri samstarvinum, so átti MB fyrst at greitt síni viðurskifti við hini feløgini í oynni, er eftirfylgjandi staðfestingin.

### Slíta fyrst og atkvøða aftaná

Umframt ósemjuna um pengar, so tykist nevndin vera hørm um framferðina hjá MB í málinum yvirhøvur.

Millum annað finnast tey harðliga at, at MB í seinna tíðindaskrivinum sigur Atla Gregersen, formann í fótbóltsdeildini hjá SÍF, arbeiða fyri, at avtaka MB og SÍF sum fótbóltsfeløg. Sambært felagsliðnum, so er júst Atli ein av stóru drívmegunum aftan fyri fótbóltin í oynni, og tí harmast tey um, at hann soeliðis skal leggjast undir at forkoma fótbóltinum.

Og at enda, so finst FS Vágar eisini framvegis at, at nevndin í MB soleiðis hevur handlað sjálv, uttan at spyrja hvørki leikarar ella felagslimir fyrst.

Viðtøkurnar hjá MB staðfesta greitt, at skal samstarvið uppsigast, so skulu 2/3 av einum viðtøkuførum aðalfundi taka undir við hesum, og nevndin sigur so eisini, at hesin aðalfundur skal haldast í heyst.

Men sambært nevndini hjá felagsliðnum, so er hetta langt úti.

– Tað svarar til, at landsstýrið fyrst tekur loysing, og eftirfylgjandi fer at halda fólkaatkvøðu, hvørt vit yvirhøvur skulu loysa. Og fleiri av okkum tóku eisini lut á seinasta aðalfundi hjá MB, og har varð so í øllum førum ikki staðfest, at nevndin skuldi taka hetta stigið, soleiðis sum tey annars siga seg hava fingið heimild til, er seinasta staðfestingin úr FS Vágum, har tað sostatt framvegis tykist vera stríð um hvør, hvat og hvussu í sambandi við slitið.

Høng Gymnasium og HF

Á Høng Gymnasium hendur tað eisini naka, tá ið klokkan hevður ringt út



Gymnasium og HF – skeið við kostdeild.
Ring ella hygg á heimasíðu okkara.

www.hoeng-gymhf.dk
tlf.:+45 5885 2636